## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin frískar hann vindin av suðri og regn ella mjørki. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og stundum regn ella mjørki. Út á seinnapartin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið Ólavsøkudag:**
Hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin lækkar hann niður í sunnan og regn. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Listamaður, ið flytir seg

**Um ólavsøkuna sýnir Torbjørn Olsen fram í Gallarí Fríðriksvág í Vágsbotni, haðani hann eisini hevur mong myndevni. Listamaðurin er tó fluttur í nýggj arbeiðshøli, so møguliga kemur broyting í, so framtíðin ikki í so stóran mun verður Havnin vestureftir**

LIST
*Dagfinn Olsen*

Listin flytir seg, verður tikið til og tað er so satt sum tað er sagt.

Í mong ár húsaðust fleiri listamenn í einum húsum við Vestaruvág. Seinnu árini hava Olivur við Neyst og Torbjørn Olsen verið har, men húsini verða nú gjørd í stand og listin má víkja og er flutt.

Torbjørn er fluttur nakrar metrar niðan í Bringsnagøtu, har hann fæst við at fáa myndir lidnar til framsýning, ið verður í Gallarí Fríðriksvág í Vágsbotni. Enn er ikki síðsta strokið komið á løriftini, men Torbjørn metir, at tað ger einki, um onkur málningur hongur og todnar á framsýningini.

*Torbjørn Olsen sýnir fram um ólavsøkuna í Gallarí Fríðriksvági í Vágsbotni. Myndevnini eru Havnin vestureftirt, andlitsmyndir og onkur mynd av bygd. Á myndini sæst listamaðurin við mynd av Haldarsvík og mynd av listamanninum Janusi Kamban*

*(Mynd: Dagfinn Olsen)*

Myndevnini eru mest Havnin, vestureftir, onkur mynd av bygd og portrett. Torbjørn hevur serstakan stíl og millum persónarnar á myndunum er annar listamaður, nevniliga Janus Kamban.

- Eg máli oftast beinleiðis eftir persóninum og geri síðani myndirnar lidnar seinni, sigur Torbjørn, og sipar til myndina av Janusi Kamban, sum er eini 2 ára gomul, men sum Torbjørn júst hevur lagt síðstu hond á, eftir at hava gingið og hugt eftir henni í longri tíð, men ikki havt dirvi at rørt við.

- Tað er ræðuligt, at ein skal vera so bangin, hugleiðir og smílist listamaðurin, ið telist millum teir virknu og væl dámdu listamenninar her heima og sum hevur verið biðin til fleiri stórverk, t.d. altartalvur, seinnu árini.

- Tað er ljósið og litirnir, ið eg arbeiði við, sigur Torbjørn, ið tó ikki vísir aftur, at møguliga kemur broyting í myndevnini, nú hann ikki hevur Havnina vestureftir í vindeyganum.

10 oljumálningar eru á sýningini, umframt litografi og vatnlitsmyndir.

Framsýningin letur upp eftir kappróðurin leygardagin. Framsýningin er opin ólavsøkuaftan frá klokkan 17 til 20 og ólavsøkudag frá klokkan 14 til 20. Myndirnar hanga eisini í Gallarí Fríðriksvági nakað eftir ólavsøku.

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Original
bosal
Útstoyt
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 23 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 35 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Eitt hátrýst, 1021 hPa. yvir Suður-Noreg viknar. Eitt lágtrýst, 982 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing.

Djúpa lágtrýstið við Hvarvið fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum Ólavsøkuaftan.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/07 kl. 06⁰⁰– 26/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 25/07 kl. 06⁰⁰– 26/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 51,0 mm

Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 27. juli: | Fyrra kvarter |
| 4. august: | Full sól |
| 5. august: | Mánin longst frá jørðini |
| 12. august: | Seinna kvarter |

Kelda. Almanakkin 2001.

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. juli | 00.37 | 13.11 | — | 12.11 | — | 12.26 | 02.37 | 15.11 | 03.37 | 16.11 | 11.26 | — | 10.26 | 23.01 | 00.52 | 13.26 | 01.52 | 14.26 | 00.22 | 12.56 | 01.37 | 14.11 |
| 28. juli | 01.46 | 14.22 | 00.46 | 13.22 | 01.01 | 13.37 | 03.46 | 16.22 | 04.46 | 17.22 | 00.01 | 12.37 | 11.37 | — | 02.01 | 14.37 | 03.01 | 15.37 | 01.31 | 14.07 | 02.46 | 15.22 |
| 29. juli | 02.59 | 15.23 | 01.59 | 14.23 | 02.14 | 14.38 | 04.59 | 17.23 | 05.59 | 18.23 | 01.14 | 13.38 | 00.14 | 12.38 | 03.14 | 15.38 | 04.14 | 16.38 | 02.44 | 15.08 | 03.59 | 16.23 |
| 30. juli | 03.48 | 16.12 | 02.48 | 15.12 | 03.03 | 15.27 | 05.48 | 18.12 | 06.48 | 19.12 | 02.03 | 14.27 | 01.03 | 13.27 | 04.03 | 16.27 | 05.03 | 17.27 | 03.33 | 15.57 | 04.48 | 17.12 |
| 31. juli | 04.36 | 17.02 | 03.36 | 16.02 | 03.51 | 16.17 | 06.36 | 19.02 | 07.36 | 20.02 | 02.51 | 15.17 | 01.51 | 14.17 | 04.51 | 17.17 | 05.51 | 18.17 | 04.21 | 16.47 | 05.36 | 18.02 |

Flog-ferðir
ring
345900